Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting: 08-01-2024
Mál nr.: 23/21201
Málsviðgjørt: MM

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (Barnaverndarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, verða gjørdar hesar broytingar: **1.** Í § 14 verður sum stk. 7 sett: "*Stk. 7.* Fáa persónar í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi innan barnaøkið og ungdómsøkið fyri tað almenna, kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn undir 18 ár, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, kunnu tey boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum. Ásetingin fevnir eisini um ófødda barnið, sum vegna viðurskifti hjá foreldrunum, kann fáa tørv á serligum stuðli eftir føðing."

	2. Í § 19 verður sum stk. 5 sett: "*Stk. 5.* Barnaverndarnevndin kann, við samtykki frá og í samstarvi við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta fyriskipanir sambært § 15, stk. 1 í verk fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman."
	3. Í § 21 verður sum stk. 3 sett: "*Stk. 3.* Tá tað verður mett neyðugt í mun til endamálið við heimansetanini, skal barnaverndarnevndin, grundað á eina leypandi uppfylgjan og eftirlit við barninum sambært § 16, taka avgerð um viðgerð og útbúgving o.a., ímeðan barnið er sett heiman."
	4. Í § 42, stk. 2, nr. 4 verður "á fundinum, og" broytt til: "á fundinum."
§ 42. Gerðabók verður førd yvir fundir hjá barnaverndarnevndum. *Stk. 2.* Upplýsast skal: 1) hvør var til staðar á fundinum, 2) hvørji mál hava verið fyri, 3) um navn og aldur á teimum børnum, hvørs mál hava verið viðgjørd, 4) um skjøl, sum eru framløgd á fundinum og um frágreiðingar, sum eru givnar á fundinum, og 5) um tey ráð, sum eru givin á fundinum	**5.** § 42, stk. 2, nr. 5 verður strikað.
	6. Í § 58 verður sum stk. 4 sett: "*Stk. 4.* Í heilt serligum førum kann avtala gerast ímillum barnaverndarnevndir um, at eitt barnaverndarmál verður flutt frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Avvarðandi barnaverndarnevnd avger um eitt barnaverndarmál kann verða flutt til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita eftir umbøn frá foreldramyndugleikanum."
	7. Í § 65, stk. 1 verður "um avgerðina." broytt til: "um avgerðina, sbrt. tó stk. 3."

	8. Í § 65 verður sum stk. 3 sett: "*Stk. 3*. Avgerðir um at flyta eitt barnaverndarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita sbrt. § 58, stk. 4, kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika."
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2024.